FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES

Fiskivinnuroyndir
Postboks 347
Yviri við Strond 15
100 Tórshavn

Klaksvík
31.05.2021

# Endalig frágreiðing um verkætlanina "Stovnan av felagsskapi at taka sær av burðardygd í føroyskari fiskivinnu"

| **Heiti á verkætlan**:<br>Stovnan av felagsskapi at taka sær av burðardygd í føroyskari fiskivinnu | **Ár byrjan og endi**:<br>1. januar 2020 – 31. Desember 2021 |
|---|---|
| **Skrivað hevur**:<br>Navn: Durita í Grótinum<br>Stovnur ella virki: FISF<br>t-postur: durita@jfk.fo, fisf@fisf.fo | |

**Endamálið við verkætlanini**:
Endamálið við verkætlanini er at kjølfesta miðvísa arbeiðið við at fáa føroyskan fiskiskap altjóða góðkendan sum burðardyggan fiskiskap. Í tí sambandi verða førleikir mentir, netverk skapt og sett verður út í kortið viðvíkjandi víðarimenning av burðardyggum fiskiskapi í Føroyum.

**Samandráttur av úrslitum**:
***Førleikamenning av lyklastarvsfólki***
Í samsvar við stuðulsumsóknina bleiv starvsfólk sent á skeið hjá MSC fyri at styrkja førleikarnar til at menna góðkenningarnar hjá føroyskari fiskiveiðu framyvir. "MSC level 2 training"
***Stovnan av felag til at fremja burðardygga fiskivinnu***
Felagið Faroe Islands Sustainable Fisheries (FISF) er stovnað. Heimasíðan www.fisf.fo er gjørd umframt at nógv kunningartilfar er framleitt til heimasíðuna.
Felagið er skipað sum eitt partafelag við nevnd umboðandi manningar, skipaeigarar og stigtakarar. Harumframt hevur felagið eisini eina 'ráðgevandi nevnd' við umboðum fyri allar áhugapartar í fiskivinnuni.

| |
|---|
| Í viðtøkunum fyri felagið er ásett, at endamálið við felagnum er at taka sær av burðardygd i føroyskari fiskivinnu, og at fáa føroyskan fiskiskap altjóða góðkendan sum burðardyggan fiskiskap. Felagið er leyst av øllum partapolitiskum áhugamálum og kann ikki stuðla politiskum feløgum ella politiskum verkætlanum.<br>Virksemi í felagnum er byrjað í apríl 2021, tá fráboðan fór til MSC um, at FISF yvirtekur allar MSC góðkenningarnar sum ávikavist JFK Trol, Framherji, og Faroe Origin higartil hava havt ábyrgdina av, tvs. góðkenningar fyri upsa, longu og brosmu og ávegis góðkenningina fyri tosk og hýsu í føroyskum sjógvi. Umframt góðkenningina av toski, hýsu og upsa í Barentshavinum. Føroyska atgongdin til MSC góðkenning av toski, hýsu og upsa í íslendskum sjógvi fylgir við. Hesar góðkenningar framganga nú av heimasíðuni www.fisf.fo.<br>***Verkstovur um ætlanir fyri burðardyggari fiskivinnu***<br>Fundarvirksemi við ymsu áhugabólkarnar í fiskivinnuni, umframt at nevndarfundir eru hildnir í felagnum sjálvum. Harumframt er avtalaður stórur kunningarfundur í juni 2021, har allir viðkomandi partar verða bodnir við til kunningina um støðuna við MSC góðkenningum og ætlanum fyri menning av burðardygd í føroyskari fiskivinnu komandi árini.<br>***Góðkenningar av fiskiveiðu sum burðardygga***<br>Arbeitt verður ítøkiliga við góðkenning av fiskiveiðuni eftir toski og hýsu í føroyskum økið, har ávís átøk eru sett í verk og onnur eru væntandi í samstarvi við Havstovuna eftir boðum frá MSC. Eisini verður ítøkiliga arbeitt við góðkenningunum av fiskiveiðuni eftir reyðsprøku og tungu í føroyskum sjóøkið sum burðardygga. |

| | |
|---|---|
| **Váttan/undirskrift frá verkætlanarleiðara**: | Durita í Grótinum, verkætlanarleiðari |

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES

# Innihald


**Innleiðing** ..... 4

**Stovnan av felagnum FISF** ..... 6

**Virksemi felagsins snýr seg serliga um MSC góðkenningar** ..... 7

**Partur av MSC góðkenningunum hjá FISF** ..... 10

**Yvirtøka av øllum MSC góðkenningum** ..... 12

**Førleikamenning og netverk** ..... 14

**Nýggj heimasíða og nýtt brand** ..... 16

**Kunningarvirksemi um ætlanir fyri burðardygd** ..... 17

**Fíggjarligur status og umbøn um restupphædd** ..... 17

*Fylgiskjal 1: Skráin fyri skeiðið í MSC Level 2, sum bleiv fíggjað av FVG* ..... 19

*Fylgiskjal 2: Skráin fyri skeiðið í MSC Level 1, sum var ein fortreyt fyri at luttaka á MSC Level 2.* ..... 22




## Innleiðing

Í nógv ár hevur føroyska fiskivinnan samstarva um at fáa føroyska fiskiveiðu altjóða góðkenda sum burðardygga. Við studninginum frá Fiskivinnuroyndum hevur fiskivinnan nú tikið enn eitt stig á burðardyggu leiðini og stovna felag til at røkja hetta virksemi og røkka framfýsnum málum um burðardygd.

Endamálið við verkætlanini var at kjølfesta miðvísa arbeiðið við at fáa føroyska fiskiveiðu altjóða góðkenda sum burðardygga. Í tí sambandi verða førleikir mentir, netverk skapt og sett verður út í kortið viðvíkjandi víðarimenning av burðardyggum fiskiskapi í Føroyum.

Á árligu ráðstevnuni hjá FiskivinnuGransking í 2013 hevði Gisli Gislason frá MSC framløgu. Longu tá vísti Gisli føroysku fiskivinnuni á tørvin á at skipað seg í eitt felag fyri øll í fiskivinnuni til at fremja burðardyggu dagsskránna. Heilt ítøkiliga mælti Gisli til, at felag bleiv stovnað við heitinum Faroe Islands Sustainable Fisheries. Hetta fingu vit áminning um frá Gisla, nú vit høvdu stovnað felagið við júst hesum navni, hóast tað ikki kom frá tí framløguni.

Í hesi frágreiðing verður greitt frá teim úrslitunum, sum eru rokkin í mun til ætlanirnar, ið blivu lagdar fram í umsóknini um stuðul frá Fiskivinnuroyndum (FVR) í 2019. Førleikarnir at menna eina burðardygga fiskivinnu eru blivnir mentir. Fleiri netverk eru blivin styrkt, bæði innanhýsis í føroysku fiskivinnuni og uttanhýsis við tilsvarandi feløg í Grønlandi og Íslandi. Sett er út í kortið viðvíkjandi framtíðar ætlanunum fyri víðari menning av burðardyggum fiskiskapi í Føroyum, har vit heilt ítøkiliga hava sett á stovn felag til at røkja og menna altjóða góðkenningar av føroyskari fiskiveiðu sum burðardygga.

FAROE ISLANDS SUSTAINABLE FISHERIES

Frágreiðingin endar við eini uppgerð av fíggjarligu støðuni í verkætlanini, har biðið verður um at fáa útgoldið restina av stuðulsupphæddini á tilsamans kr. 300.000. Restupphæddin er kr 100.000. Upprunaliga tíðarætlanin var at fáa avgreitt verkætlanina yvir árini 2020-2021, harav virksemi fíggjað av Fiskivinnuroyndum serliga lá í 2020. Nakað av hesum virksemi bleiv darva og dróg út, soleiðis at hetta nú er avgreitt fyrstu 5 mánaðirnar av 2021. Sosatt er alt virksemi, sum er fíggjað av Fiskivinnuroyndum nú avgreitt.

# Stovnan av felagnum FISF

Felagið Faroe Islands Sustainable Fisheries (FISF) bleiv formliga stovnað í januar 2021 við at stovnararnir settu partapening í felagið. Fyrsti formligi nevndarfundur bleiv hildin í mai 2021, tá fylgjandi nevndarlimir blivu valdir: Hanus Hansen, nevndarformaður, Anfinn Olsen, Jan Højgaard, Alfred Petersen og Durita í Grótinum. Stjóri felagsins er Durita í Grótinum. Harumframt er avtala gjørd um at manna eina ‘ráðgevandi nevnd’ við umboðum fyri áhugapartar í fiskivinnuni. Ítøkiliga verða umboð fyri hesi feløg boðin við í ráðgevandi nevndina: Faroe Origin, Delta Seafood, Kósin, PRG, Vaðhorn, Sandoy Seafood, Tavan, Faroe Marine Products (FMP), frystilínuskip, verksmiðutrolarar, landingarmiðstøðirnar, Fiskamarknað Føroya (FMF), Havstovan, meginfelag útróðrarmanna (MÚ), manningarfeløgini, Januar og sølufeløgini Rainbow, Nevið og Landshandilin.

Í viðtøkunum fyri felagið er ásett, at endamálið við felagnum er at taka sær av burðardygd i føroyskari fiskivinnu, og at fáa føroyskan fiskiskap altjóða góðkendan sum burðardyggan fiskiskap. Felagið er leyst av øllum partapolitiskum áhugamálum og kann ikki stuðla politiskum feløgum ella politiskum verkætlanum.

FISF er felag hjá føroysku fiskivinnuni, hvørs endamál er at gera fiskavørur frá burðardyggum fiskiskapi meira atkomiligar fyri heimsins tilvitaðu forbrúkarar. Ítøkiliga vil felagið virka fyri at fáa altjóða góðkenningar av føroyskum fiskiskapi sum burðardyggan og fremja neyðug átøk í vinnuni til tess at røkka hesum. Ein fortreyt fyri hesum virksemi er, at føroyska granskingarumhvørvið, serliga Havstovan, áhaldandi veitir nøktandi fiskifrøðiligar og hagtalsligar greiningar av støðuni hjá fiskastovnunum.

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES

## Virksemi felagsins snýr seg serliga um MSC góðkenningar

Í Føroyum hevur fiskivinnan í stóran mun valt at latið felagsskapin Marine Stewardship Council (MSC) borga fyri altjóða góðkenning og yvirvøku av fiskiskapi okkara. Við at velja fiskavørur við MSC-merkinum stuðlar brúkarin fiskiskapi, ið verjir havumhvørvi okkara og eggjar øðrum at gera tað sama. MSC-góðkenningin byggir á tríggjar meginreglur: (1) Fiskiveiðan skal vera burðardygg fyri stovnin. (2) Atknýtta vistskipanin skal varðveitast. (3) Fiskiveiðuskipanin skal liva upp til hóskandi krøv.

Gisli Gislason frá MSC hevur verið samstarvsfelagi hjá føroysku fiskivinnuni øll árini:
"Í Grønlandi, Íslandi og Noregi skipaði fiskivinnan seg í felag í samstarvinum við MSC, meðan vinnan í Føroyum hevur brúkt MSC hvør sær. Á tiltaki hjá Fiskivinnugransking í 2013 nevndi eg í eini framløgu hugskotið, at vinnan í Føroyum kundi skipað virksemi við burðardygd í eitt felag fyri øll í fiskivinnuni. Eg eri sera fegin um, at føroyska fiskivinnan nú hevur valt at skipað seg í einum felag, sum fæst við altjóða góðkenningar av burðardygd. Hetta fer at styrkja menningina og vitanardeilingina í føroyskari fiskivinnu."

Marine Stewardship Council (MSC) arbeiðir fyri at fremja eina ábyrgdarfulla fiskivinnuumsiting og burðardyggar mátar at varðveita fiskivinnusamfeløg í framtíðini. MSC bleiv stovna í 1997 og er ein sokallað ikki-fyri-vinning felagsskapur við høvuðssæti í London. Felagsskapurin rekur eina altjóða skipan við góðkenningum, hvørs endamál er at fremja burðardyggan og ábyrgdarfullan fiskiskap. Meginreglurnar handan MSC-góðkenningina byggja á leiðreglurnar fyri ábyrgdarfullan fiskiskap, sum ST-felagsskapurin FAO virkar eftir.

FISF • Kósarbrúgvin 3 • P.O. Box 56 • FO-710 Klaksvík • Tel +298 409900 • Fax +298 409901 • fisf@fisf.fo • www.fisf.fo




MSC-góðkenningin byggir á tríggjar meginreglur:

- **Meginregla (Prinsip 1 - P1).** Fiskiskapurin skal vera á einum støði, sum er burðardygt fyri fiskastovnin.
- **Meginregla (Prinsip 2 - P2).** Fiskiskapurin skal rekast á slíkan hátt, at atknýtta vistskipanin varðveitir sín bygnað, úrtøku, funktión og margfeldni.
- **Meginregla (Prinsip 3 - P3).** Fiskiskapurin skal liva upp til staðbundin, landsfevnandi og altjóða lóggávu og hava eina umsitingarskipan, sum kann gera ræmtandi inntriv í mun til broytt viðurskifti og varðveita burðardygdina.

Ein MSC góðkenning er ein 5 ára leypandi tilgongd. Fyrsta árið byrjar við eini góðkenning (Full assessment), síðani við árligum eftirliti (Surveilliance audit) 4 ár á rað. Har tað fjórða árið eisini er byrjanin uppá nýggja tilgongd, endurgóðkenning (Re-assesment).



Tá eitt fiskarí verður MSC góðkent, er tað oftani við treytum (Conditions), har ánarin av góðkenningini skal taka sig at fáa krøvini í treytinum í rættlag. Tað er ein fyrimunur, at MSC góðkenningarnar eru savnaðar saman í einum felag, tá treytirnar skulu loysast.
Tað eru 28 mát fyri framgongd í fiskarí standardinum, sum liggja undir teim trimum meginreglunum. Eitt fiskarí verður tilluta eitt stigatal fyri hvørt mát, har 60 er minst loyvda stigatal, 80 er besta praksis á heimsstøði, meðan 100 er nærum fullkomi.
Fyri at blíva góðkent má eitt fiskarí fáa minst 60 stig í hvørjum av teimum 28 mátunum. Fær eitt fiskarí millum 60 og 79 í onkrum máti, verður tað álagt at bøta um støðuna, soleiðis at mátið røkkur 80 ella meira innan fimm ár. Hetta verður nevnt ein treyt (condition).

Eitt dømi uppá eina treyt, sum skal loysast fyri fiskiskap eftir longu og brosmu í føroyskum sjógvi, er, at árinskanning skal gerast, sum lýsir árinini av línureiðskapi á sjógugl. Hendan treytin verður loyst í serskildari verkætlan, sum verður fíggjað av Fiskivinnuroyndum og FISF.




Miðal stigatalið fyri hvørja meginreglu (prinsipp) skal vera yvir 80, um góðkenningin skal veitast. Um ein ella fleiri PI eru undir 80, verða treytir settar, sum síðani skulu loysast innan eitt 5 ára tíðarskeið, áðrenn fiskaríið verður endurgóðkent.

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES




## Partur av MSC góðkenningunum hjá FISF

Ofta hevur tað verið torskilt at skilja ímillum, hvør er partur av eini MSC góðkenning, og hvør ikki er.
Tey luttakandi fiskiførini/luttakandi feløg fáa MSC-góðkenningina og verða allýst sum UoC (unit of certification). Onnur fiskifør/feløg kunnu vera virkin í sama fiskiskapi ella UoA (unit of assessment) uttan at fáa góðkenning, tá tey ikki luttaka í góðkenningartilgongdini. Men hesi skip kunnu seinni søkja um at blíva partur av MSC-góðkenningini.
Ein broyting er eisini, at MSC góðkenningarnar fevna um øll skrásett fiskifør, sum hava galdandi fiskiloyvir frá Fiskimálaráðnum, um fiskurin verður veiddur og/ella keyptur av felag, sum er skrásett hjá FISF. Á heimasíðuni hjá FISF sæst altíð ein dagførdur listi yvir, hvørji feløg eru partur av góðkenningini, [https://www.fisf.fo/fo/partur-av-godkenning/](https://www.fisf.fo/fo/partur-av-godkenning/).

Tey, sum eru partur av eini góðkenning, verða nevnd UoC (unit of certification), onnur, sum ikki eru partur av eini góðkenning verða nevnd UoA (unit of assessment). Hædd verður tikið fyri øllum í eini MSC góðkenning.

MSC góðkenningar eru opnar fyri at onnur, sum í MSC málið verða nevnd “other eligible fisheries”, sum eru partur av UoA, og sum hava fiskiloyvi at fiska í føroyskum sjógvi, kunnu blíva partur av góðkenningini. Tað krevur, at tey gera avtalu við FISF um at blíva partur av góðkenningini.




Allar góðkenningar eru at síggja inni á heimasíðuni hjá FISF, [https://www.fisf.fo/fo/godkend-fiskari/](https://www.fisf.fo/fo/godkend-fiskari/).

# Góðkenningar

Hvørt fiskarí fær sína egnu góðkenning frá MSC. Góðkenningin varar í fimm ár, tá góðkenningin skal endurnýggjast við eini tilgongd. Á hvørjum ári verður skipað fyri árligum eftirliti av góðkenningunum.

Niðanfyri er víst verandi góðkenningar frá MSC av føroyskum fiskiskapi.




**Toskur, hýsa og upsi í Barentshavinum**

**MSC-F-31322**
Góðkent síðani 17.08.2012
góðkenning galdandi til 17.02.2023.




**Upsi undir Føroyum**

**MSC-F-31374**
Góðkent síðani 15.06.2013
góðkenning galdandi til 15.12.2023.




**Longa og brosma undir Føroyum**

**MSC-F-31404**
Góðkent síðani 24.10.2018
góðkenning galdandi til 24.04.2024.




**Toskur og hýsa undir Føroyum**
Til góðkenningar.




**ISF Icelandic cod**




**ISF Icelandic haddock**




**ISF Icelandic saithe**

Allar góðkenningar eru at síggja inni á heimasíðuni hjá FISF, https://www.fisf.fo/fo/godkend-fiskari/.

## Yvirtøka av øllum MSC góðkenningum

Higartil hevur MSC givið føroyskari fiskiveiðu fleiri góðkenningar, millum hesar eru: Fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa í Barentshavinum (í 2012), upsafiskiskapin undir Føroyum (í 2013) og fiskiskapin eftir longu og brosmu undir Føroyum (í 2018).

FISF fer framyvir at standa fyri enn fleiri MSC góðkenningum av føroyskari fiskiveiðu, bæði at røkja verandi og at fáa nýggjar góðkenningar. Í løtuni verður arbeitt við at fáa eina MSC góðkenning av fiskiskapinum eftir toski og hýsu undir Føroyum, og væntar FISF at koma á mál við hesi góðkenning seinni í ár. Eisini er gongd í verkætlan at fáa eina MSC undangóðkenning av fiskiskapinum eftir reyðsprøku og tungu í føroyskum sjógvi.

Virksemi í felagnum byrjaði í apríl 2021, tá fráboðan fór til MSC um, at FISF yvirtekur allar MSC góðkenningarnar, sum ávikavist JFK Trol, Framherji, og Faroe Origin hava havt ábyrgdina av, tvs. góðkenningar fyri upsa, longu og brosmu og ávegis góðkenningina fyri tosk og hýsu í føroyskum sjógvi. Umframt góðkenningina av toski, hýsu og upsa í Barentshavinum. Føroyska atgongdin MSC góðkenning av toski, hýsu og upsa í íslendskum sjógvi fylgir við. Hesar góðkenningar framganga nú av heimasíðuni www.fisf.fo.

Øll fiskifør, sum ynskja at verða partur av góðkenningunum, skulu skráseta seg sum luttakara í MSC góðkenningini hjá FISF. Luttakarar skulu 1. juni 2021 rinda eitt luttakaragjald til FISF til at fíggja virksemi framyvir, t.e. uttanhýsis útreiðslur til serliga MSC og DNV og innanhýsis útreiðslur til fyrisiting og menning. Sostatt er virksemi felagsins eisini fíggjarliga burðardygt, har javnvág verður millum inntøkur og útreiðslur til bæði bæði dagligan rakstur og framtíðar menning.

Association of SUSTAINABLE FISHERIES www.sustainfish.org

FISF er limur í Association of Sustainable Fisheries (ASF), sum er felagskapur sum røkir áhugamál hjá MSC góðkendum aktørum. Eisini hevur FISF reguligt samband við Iceland Sustainable Fisheries (ISF.is) (samstarva um Barentshavið og Ísland) og Sustainable Fisheries Greenland (SFG.gl) (samstarva um rækjur).

ISF Iceland Sustainable Fisheries

Sustainable Fisheries Greenland

# Førleikamenning og netverk

Í umsóknini til FiskivinnuGransking bleiv millum annað nevnt, at tørvur er á førleikamenning av lyklastarvsfólkum í Føroyum fyri at víðarimenna virksemi við góðkenning av føroyskari fiskiveiðu sum burðardygga. Tí luttók eitt lyklastarvsfólk eisini á skeiði hjá MSC í Level 2 Capacity Building í januar 2020.

Innihaldið í skeiðnum var fjølbroytt við nógvum ymiskum serfrøðingum á ymsu økjunum, sum høvdu fyrilestrar og útflýggjaðu kunningartilfar. Skráin á skeiðnum er viðfest sum fylgiskjal 1.

Viðkomandi starvsfólk hevur áður tikið Level 1 umframt annað skeiðsvirksemi hjá MSC við tí fyri eyga støðugt at menna lokalu vitanina í Føroyum um góðkenningartilgongdirnar og krøvini frá MSC – og frá NGO'arum og viðskiftafólkum.


Marine Stewardship Council

Durita i Grotinum

attended the
Marine Stewardship Council
Level 2 Capacity Building workshop:
*'Working towards MSC certification'*
held in London, United Kingdom, 27 – 31 January 2020

Jaco Barendse
MSC Senior Accessibility Manager

Skjalfesting frá MSC um, at Durita í Grótinum hevur tikið Level 2 hjá MSC.

Ein fyritreyt fyri at luttaka á MSC Level 2 skeiðnum var, at luttakarin hevði tikið MSC Level 1 skeiðið. Hetta skeið tók Durita í Grótinum í november 2019 í Rekjavík, skráin fyri Level 1 skeiðið er lýst í fylgiskjali 2.

Umframt skeiðsvirksemi er luttøka í altjóða ráðstevnum og verkstovum avgerandi neyðugt fyri at hava nøktandi kunnleika til rák og vitan innan

økið. FISF luttekur millum annað árliga á NASF ráðstevnuni í Bergen, har skráin seinnu árini ber meira og meira brá av, at MSC góðkenningar seta dagsskránna. Aðrar MSC góðkendar fyritøkur, MSC og aðrir viðkomandi felagsskapir luttaka eisini á hesi ráðstevnu, sum tí gevur gott høvi at menna og røkja netverkið.

## Nýggj heimasíða og nýtt brand

Heimasíðan www.fisf.fo er gjørd sum veiting frá Sansir, sum eisini stóð fyri menningini av nýggjum búmerki til FISF, sum soleiðis verður eitt sjálvstøðugt 'brand' mótvegis umheiminum og føroyska samfelagnum. Harumframt er nógv kunningartilfar framleitt til heimasíðuna á føroyskum og enskum málið.

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES




Screenshot av nýggju heimasíðu felagsins, www.fisf.fo

Framyvir verður heimasíðan og brand felagsins samskiftispallurin, sum FISF fer at samskifta umvegis. Tað hevur tí verið til stórt gagn fyri samstarvið millum partarnar í føroysku fiskivinnuni, at Fiskvinnuroyndir lat stuðul til millum annað at fáa ment eina nýggja heimasíðu til kunning og marknaðarføring.




Eitt upplagt menningarøki framyvir er at fáa íblástur frá teim 17 Heimsmálunum hjá ST fyri eitt burðardygt samfelag, har FISF serliga kann geva sítt íkast til mál 14, “Lívið í Havinum”. Á tann hátt kann burðardygg fiskiveiða víðarimennast sum hugtak í hesum høpi til eisini at fevna um onnur økir enn burðardygg gagnnýtsla av fiskastovnunum.

## Kunningarvirksemi um ætlanir fyri burðardygd

Hildnir eru fleiri fundir við ymsu áhugabólkarnar í fiskivinnuni, umframt at nevndarfundir eru hildnir í felagnum sjálvum. Harumframt er avtalaður stórur kunningarfundur í juni 2021, har allir viðkomandi partar verða bodnir við til kunningina um støðuna við MSC góðkenningum og ætlanum fyri menning av burðardygd í føroyskari fiskivinnu komandi árini. Fundarhølið og fyrilestrahaldari er umbiðið.
Ætlanin er annars eisini regluliga at bjóða øllum luttakandi pørtum til árligan kunningarfund, vanliga ísamband við Seafood Expo Global (SEG). Her verður kunnað um støðuna við verandi góðkenningum, ætlanum um nýggjar góðkenningar og altjóða rákini innan góðkenning av burðardyggari fiskivinnu.

## Fíggjarligur status og umbøn um restupphædd

(Roknskapur frá byrjan til dagfestingina niðanfyri)

| Status tann 31.05.2021 | | **A** Kostnaðarætlan Smb. umsókn (4/11-2019) | **B** Roknskapur Pr. status dato | **D** Mett restina av árinum |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur: | Fiskivinnuroyndir | 300.000 | 200.000 | 100.000 |
| | Virðismett eginavrik (løn+skrivstovuhald) | 850.000 | 587.500 | 262.500 |
| | Eginfígging, reiður peningur | 85.000 | 85.000 | 0 |
| | Onnur fígging | 0 | | |
| | | | | |
| | **íalt** | 1.235.000 | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur: | Lønir | 850.000 | 587.500 | 262.500 |
| | Keyp av vørum og tænastum* | 200.000 | 213.000 | XXX |
| | Leiga/keyp av maskinum/tólum o.ø. | | | |
| | Rakstrargjald | 120.000 | 85.000 | 35.000 |
| | Ymiskt **(Førleikamenning) | 65.000 | 58.841 | |
| | | | | |
| | **Íalt** | 1.235.000 | 616.232 | 33.333 |
| | | | | |

*Búmerkið, heimasíða, skrivligt tilfar til heimasíðu, umseting, lýsingar, brøv og annað grafist tilfar. Skráseting av felagi, advokatur.
**MSC level 1 og level 2 skeið, NASF og kunningarfundur.

Við hesi endaligari frágreiðing um virksemi í sambandi við verktætlanina viðvíkjandi stovnan av felag at taka sær av burðardygd í føroyskari fiskivinnu endar verktætlanin fyri so vítt viðvíkur virkseminum fíggjað av Fiskivinnuroyndum. Sjálvt felagið heldur sjálvandi áfram við sínum virksemi við at endurnýggja verandi góðkenningar og menna nýggjar góðkenningar av føroyskari fiskiveiðu sum burðardygga.

FISF • Kósarbrúgvin 3 • P.O. Box 56 • FO-710 Klaksvík • Tel +298 409900 • Fax +298 409901 • fisf@fisf.fo • www.fisf.fo

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES

Fylgiskjal 1: Skráin fyri skeiðið í MSC Level 2, sum bleiv fíggjað av FVG

## Marine Stewardship Council
## Level 2 Capacity Building Training
## London, United Kingdom, 27-31 January 2020

Draft Agenda

Capacity Building Workshop: 'Working towards MSC Certification'

Venue: CCT Venues Barbican (135-137 Aldersgate St, Barbican, EC1A 4JA)

| TIME | DESCRIPTION | LEAD |
|---|---|---|
| | **DAY 1** | |
| 08:30 – 09:00 | **Registration** | **All** |
| 09:00 – 09:30 | **Welcome and introductions** | **MSC** |
| 09:30 – 10:30 | **Introduction to the MSC and the Fisheries Standard**<br>An introduction to the MSC Program, the MSC's Standard for sustainable fishing and an outline of the process for scoring fisheries against the standard | **MSC** |
| **10:30 – 11:00** | **Tea Break** | |
| 11:00 – 12:00 | **Sustainable Fisheries management loop and the MSC Default Assessment Tree**<br>**Scoring elements**<br>**Introduction to Principle 1** | **Trainer** |
| 12:00 – 13:00 | **Principle 1: Target Stock Performance Indicators:**<br>• Stock status<br>• Stock rebuilding | **Trainer** |
| **13:00 – 14:00** | **Lunch** | |
| 14:00 – 15:30 | **Principle 1: Target stock performance Indicators**<br>• Harvest strategy<br>• Harvest control rules (HCRs) | **Trainer** |
| **15:30 – 16:00** | **Tea Break** | |
| 16:00 – 17:00 | **Principle 1:** Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| | **DAY 2** | |
| 09:00 – 10:00 | **Principle 1: Target stock performance Indicators**<br>• Information and monitoring<br>• Assessment of stock status | **Trainer** |

| | | |
|---|---|---|
| 10:00 – 10:30 | **Principle 1:** Finish Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| **10:30 – 11:00** | **Tea break** | |
| 11:00 – 11:30 | **Principle 2: Concepts and definitions** | **Trainer** |
| 11:30 – 13:00 | **Principle 2: Ecosystem Impact: Primary species**<br>• Outcome (status)<br>• Information<br>• Management | **Trainer** |
| **13:00 – 14:00** | **Lunch** | |
| 14:00 – 14:30 | **Assessing data-limited fisheries against the MSC standard: Risk Based Framework (RBF)** | **MSC** |
| 14:30 – 15:30 | **RBF for species**<br>• Consequence Analysis (CA)Productivity<br>• Susceptibility Analysis (PSA) | **MSC/Trainer** |
| **15:30 – 16:00** | **Tea break** | |
| 16:00 – 17:00 | **Principle 2: Ecosystem Impact: Secondary species**<br>• Outcome (status)<br>• Information<br>• Management | **Trainer** |
| | **DAY 3** | |
| 09:00 – 10:30 | **Principle 2: Ecosystem Impact: Endangered, threatened or protected (ETP) species**<br>• Outcome (status)<br>• Information<br>• Management | **Trainer** |
| **10:30 – 11:00** | **Tea break** | |
| 11:00 – 12:00 | **Principle 2:** Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| 12:00 – 13:00 | **Principle 2: Ecosystem Impact: Habitats**<br>• Outcome (status)<br>• Information<br>• Management | **Trainer** |
| **13:00 – 14:00** | **Lunch** | |
| 14:00 – 15:30 | **Risk Based Framework for habitats**<br>• Consequence Spatial Analysis (CSA) | **MSC/Trainer** |
| **15:30 – 16:00** | **Tea Break** | |
| 16:00 – 16:30 | **Principle 2:** Finish Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| 16:30 – 17:00 | **Local Case Study** | **Local stakeholder** |
| | **DAY 4** | |
| 09:00 – 10:00 | **Principle 2: Ecosystem Impact: Ecosystems** | **Trainer** |
| 10:00 – 10:30 | **Introduction to the MSC Chain of Custody Standard** | **MSC** |

| | | |
|---|---|---|
| **10:30 – 11:00** | **Tea break** | |
| 11:00 – 13:00 | **Pre-MSC/ fishery improvement tools:**<br>• Pre-assessment<br>• Action plan for improvement<br>• Benchmarking and tracking progress | **MSC** |
| **13:00 – 14:00** | **Lunch** | |
| 14:00 – 15:00 | **Principle 3: Management systems (Governance)**<br>• Legal & customary framework<br>• Consultation, roles and responsibilities<br>• Long term objectives | **Trainer** |
| 15:00 – 15:30 | **Principle 3:** Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| **15:30 – 16:00** | **Tea break** | |
| 16:00 – 16:30 | **Principle 3:** Group Exercise | **MSC/Trainer** |
| 16:30 – 17:00 | **Local Case Study** | **Local stakeholder** |
| | **DAY 5** | |
| 09:00 – 10:30 | **Principle 3: Management systems (Fishery specific)**<br>• Fishery specific objectives<br>• Decision making processes | **Trainer** |
| **10:30 – 11:00** | **Tea break** | |
| 11:00 – 13:00 | **Principle 3: Management systems (Fishery specific)**<br>• Compliance and enforcement<br>• Monitoring and management performance evaluation | **Trainer** |
| **13:00 – 14:00** | **Lunch (optional)** | |
| **14:00 – 15:00** | • Complete Feedback forms<br>• Summary & closing presentations<br>• Handing out of certificates | All |

FAROE ISLANDS
SUSTAINABLE
FISHERIES

## Fylgiskjal 2: Skráin fyri skeiðið í MSC Level 1, sum var ein fortreyt fyri at luttaka á MSC Level 2.

Good afternoon.
Marine Stewardship Council (MSC)is hosting a Level 1 seminar where there is training and introduction on the MSC fishery standard. The seminar will be held in the Ocean Cluster house, Grandagarði 16, in 101 Reykjavik, meeting room Bruin on the 5-6th of November 2019.

Its objective is to introduce the MSC fishery standard and get together various stakeholder around North East Atlantic together to share and exchange experience.

The attendee will receive signed document, diploma that they have attended MSC level 1 seminar. When completed then one can attend to Level 2 seminar which gives deep dive into the standard and next is planned to be in London early next year. Completion of Level 2 provides also a possible pathway/stepping stone to become involved in MSC fisheries assessments or fisheries improvement projects that use the MSC standard as a framework for improvement. It is also one of the eligibility requirements for application to the MSC Technical Consultant Register.

Each participant of the Level 1 seminar in Reykjavik will be invited a ticket to the Icelandic seafood conference, which are held in the Harpa Opera House on the 7-8th of November. Even though that conference is Icelandic event then there are few sessions in English as:

- Worldwide Online shopping of Icelandic fish (some lectures in English)
- Remote Electronic Monitoring (English session)
- The importance of origin (English session)
- Student presentations of projects from Seafood Industry-related studies (some lectures in English)
- “Shared fisheries, challenges and solutions for Sustainability” (English session)
- Is the Icelandic fishing industry interested in being an ACTIVE participant in fisheries research? (English session)

We would like to invite person(s) form your organisation to attend this Level 1 seminar which will be held in Reykjavik 5-6. November 2019. The seminar

is free of charge, but you would need to cover, travel, accommodation etc, but subsistence will be provided during the seminar.

We would like to hope that this may be of interest for you and/or any member of your organization.

We appreciate your answer

Kind reg

Gísli Gíslason
Senior Program Manager North Atlantic
Ocean Cluster House
Grandagarður 16
101 Reykjavik, Iceland

Tel: +354 5656022, Mobile: +354 8980991
gisli.gislason@msc.org
www.msc.org

